# Ráðharri stúrir fyri skuldarum



Íslendski ráðharrin Jóhanna Sigurðardóttir sigur seg stúra fyri, at nógvir íslendingar, sum eru í fíggjarligari trongstøðu, fara at koma í uppaftur verri støðu teir næstu mánaðirnar. Hon hevur tí heitt á bankarnar um at vísa fólki í fíggjarligari trongstøðu vælvild og at gera avtalur við tey um skuldina. Íslendska fíggjarmálaráðið fer í heyst at leggja lógaruppskot fyri Altingið um at hjálpa fólki, sum hava tað serliga tungt fíggjarliga. Morgunblaðið skrivar, at lógin skal hjálpa fólki burtur úr trupulleikunum, uttan at tey skulu missa sínar ognir ella fara á húsagang. Jóhanna Sigurðardóttir sigur, at tað er ikki annað enn rímiligt, at bankarnir vísa vælvild, tá fólk fáa fíggjarligar trupulleikar.

# doyarstevnan

Vakurt er í Húsavík





Ponyríðing, frágreiing og góður matur á skránni









Nógv var til børnini